Uttan økonomiskt frælsi, einki frælsi

Tað bleiv tosað nógv um tey skriv, sum send vóru samgonguflokkanna ímillum nú uppundir slitið. Men, tey søgdu ikki so lítið um hvønn politikk teir ymisku flokkarnir ætla at gjøgnumføra.

Tjóðveldisflokkurin, sum nú ikki longur tordi at standa við undirskrivaðu avtaluna, men sleit samgonguna, sendi skriv til sínar samgonguflokkar, við 9 punktum.

I punkt 1. Fiskivinnan, verður millum annað sagt:

»Sum eitt stig á leiðini at minka studningin setur Tjóðveldisflokkurin sum eitt ófrávíkiligt krav, at rakstrarstudningurin til trolarar verður tikið av.«

Fyri tað fyrsta, er hetta ein undantøkking frá samgonguskjalinum.

Í samgonguskjalinum vóru greiðar avtalur gjørdar um minking í studninginum, á skilagóðan hátt. Og hyggja vit eftir gongdini hesi árini, so hevur niðurgongdin verið, fíggjarárið 89-90, 70 mill. kr., og fíggjarárið 90-91, 35 mill. kr. Hetta er í samsvar við samgonguskjalið.

Og her loypur Tjóðveldisflokkurin frá avtaluni við sínum fyrsta punkti.

Eitt er, at man hevur sett sær fyri, at fáa fiskivinnuna at hvíla meir í sær sjálvum, við minni studningi.

Men hetta ófrávíkiliga krav Tjóðveldisfloksins, hvar man vil kappa høvdið av einum ávísum skipabólki innan fiskivinnuna, tað er ovboðið.

Tí, tað at avtaka rakstrarstudningin frá einum degi til annan, vil ikki bert kappa høvdið av okkara trolaraflota, men eisini av ávísum virkjum, og ávísum økjum í okkara landi.

Sum eitt dømi: Vestmanna Fiskavirki er størsta arbeiðspláss í bygd okkara, og vit vita eisini hvørjum skipabólki vit fáa nógv tann størsta partin av okkara rávøru.

Er tað henda flokkin vit vilja stuðla tann 17. nov., so verða tað eisini vit Vestmenningar saman við øðrum, sum koma at merkja sviðan av tí føroyska Tjóðveldinum. Tjóðveldisflokkurin fekk loyvi saman við Javnaðinum, at stjórna landi okkara tey seinastu 4 árini, upp til 1988.

Tjóðveldisflokkurin umsat fíggjarmál, hvar allir teir føroysku peningastovnarnir ikki kundu rúma tí peningafloymi, ið tá var. Í dag kenna allir Føroyingar tað sanna úrslitið, frá hesi tjóðveldistíð, og megu knógva undir byrðuni, hvar tað føroyska Tjóðveldið fullkomiliga tók alt frælsi frá okkum føroyingum.

Tí, uttan økonomiskt frælsi, einki frælsi.

Agnar Nielsen.

Hvør skuldi tað annars verið?

Nú løgtingsval er fyri framman, eru valmøguleikarnir vorðnir enn fleiri, enn teir vóru til seinasta val. Kortini kann eingin ivi vera um, at bert tað eina valið kann føra til eina arbeiðsføra og dugnaliga landsleiðslu.

Umframt teir seks flokkarnar, sum hava havt umboðan á tingi hetta seinasta valskeiðið, er nú enn ein nýggjur flokkur komin undan kavi.

Rættiliga stór ónøgd við sitandi politikarar sigst vera høvuðsgrundin undir stovnanini av hesum flokki.

Men hví man ónøgdin við fráfarandi samgongu hava verið so stór?

Eftir mínum tykki er bert eitt boð uppá líkinda svar til hendan spurning: Sambandsflokkurin hevur meira ella minni verið lamdur av sínum óarbeiðsføru samgongupartnarum, so ikki hevur borið til at føra skynsaman politikk.

Teir flokkar, Sambandsflokkurin hevur havt aftrat sær – Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin – hava ikki røkt sínar samarbeiðsligu skyldur til fulnar, og hevur samgongan tí heldur ikki fingið tað burturúr, sum ætlað var frammanundan.

Heldur ikki hevur andstøðan hetta seinasta valskeiðið verið serliga vælvirkandi.

Í fyrsta lagi sýndi hon seg at vera óáhugaða í at taka politiska ábyrgd, tá samgongan varð skipað, við tað at andstøðuflokkarnir annaðhvørt ikki vildu í samgongu, ella sluppu sær burtur úr teirri samgongu, sum var.

Hvussu slíkir flokkar kunnu vænta sær nakað álit frá veljarans síðu, er ilt at síggja. Heldur ikki sæst nakað høpi í, at hinir báðir samgonguflokkarnir við góðum vónum hætta sær út í eitt val.

Sum støðan er á politiska vígvøllinum í Føroyum í dag, er bert eitt líkinda val: Sambandsflokkurin.

Hetta er einasti flokkur, sum hevur roynt at føra ein skapandi og uppbyggjandi politikk, hóast umstøðurnar hava verið alt annað enn tær bestu.

Hóast undanførslur frá okkara samstarvsfeløgum í samgonguni at enda gjørdu av við eina samgongu, sum í grundini hevði eitt sera gott samgonguskjal at arbeiða útfrá, hevur veljarin møguleika at seta ein sterkan Sambandsflokk á ting komandi val.

Tí hvør skuldi tað annars verið, ið fekk skil á aftur okkara samfelag, um tað ikki var Sambandsflokkurin?

Heðin Mortensen

ORKURÁÐIÐ:

Oljugjaldið stuðul til føroyskan landbúnað

Hægri oljuprísur fær fólk at brúka minni olju. Men til tess ikki at leggja stein oman á byrðu – hjá eitt nú barnaríkum familjum – kundi oljugjaldið verið nýtt sum stuðul til føroyskar landbúnaðarvørur, t. d. mjólk og grønmeti, so at at húsarhaldið ikki gerst dýrari.

Hetta millum annað sigur Orkuráðið í ársfrágreiðing síni fyri farna ár.

Oljuprísurin í 1989 var rættuliga støðugur og nakað lægri enn í 1988. Miðalprísurin fyri gassolju íroknað oljugjald var í 1989 uml. 2,25 kr./litur í mun til 2 kr./litur í 1988. Tungoljuprísurin íroknað oljugjald varð í miðal uml. 1670 kr. fyri tonsið í 1989 í mun til uml. 1475 kr. fyri tonsið í 1988.

Í 1989 var samlaða oljunýtslan í føroyska samfelagnum um 246.000 tons í mun til um 243.000 tons í 1988. Størsti vøksturin í oljunýtsluni er fyri fiskavirkir, sum nýttu 8.600 tons í 1989 í mun til 4.800 tons í 1988. Av hesum nýttu flakavirkir 2.500 tons í 1989 í mun til 2.200 tons í 1988.

SEV brúkti 34.500 tons í 1989 í mun til 32.500 tons í 1988. Fiskiskip nýttu 87.000 tons í 1989 í mun til 89.000 tons árið fyri. Onnur skip, sum fyri tað mesta eru farmaskip, nýttu 24.500 tons í 1989 í mun til 25.900 tons í 1988. Akfør nýttu 24.500 tons í 1989 í mun til 26.100 tons í 1988. Oljunýtslan til upphiting var í 1989 um tað sama sum í 1988.

Elframleiðslan í 1989 var 216 mió. kWh móti 215 mió. kWh í 1988, svarandi til 0,6% vøkstur 9% árið fyri og 2% frá 1986 til 1987. Orkuráðið sigur, at vøksturin árini fyri hevur verið stív 4% um árið.

Landsbúskaparligt árin

Orkuráðið sigur, at oljuprísirnir seinastu árini eru broyttir sera nógv.

Í 1973 fekk allur heimurin ein hvøkk av oljukreppuni. Men vøksturin á oljuprísunum frá 1979 til 1981 var nógv størri enn fyrst í sjeytiárunum. Í 1986 fór so prísurin niður á næstan sama støði sum fyri 1979 og liggur nú nakað hægri enn fyrra hálvár í 1979.

Í Føroyum varð avgjald lagt á oljuna frá 3. oktober 1986, og ger hetta, at prísurin nú er umleið 130% hægri enn fyrst í 1979. Fyri 1979 var lítil prísvøkstur, men av tí økta oljukostnaðinum fór prísurin nógv upp fyrst í 1980'unum. Frá 1984 til 1987 hevur prísurin ligið á gott 1,20 kr. pr. kWh. Í 1989 var elprísurin 1,29 kr. pr. kWh, og 1. januar 1990 fór prísurin upp í 1,36 kr. pr. kWh.

At hava eina bíliga og trygga orkuveiting í samfelagnum sigur Orkuráðið hava stóran týdning. Tað er tí umráðandi at nýta tær orkukeldur, ið geva brúkarunum trygga orku til so lágan kostnað sum gjørligt. Av tí at vit hava so stóran skipaflota, nýta vit í Føroyum sera nógva olju í mun til fólkatalið. Av hesi orsøk eru útreiðslurnar til olju rættuliga tyngjandi í landsbúskapinum.

Við ymsum strikumyndum vísir Orkuráðið á, at høgur oljuprísur fær fólk til at brúka minni olju. Um oljunýstlan pr. íbúð hevði ligið niðri á sama støði sum í 1982, høvdu sethús í dag brúkt um 11 mió. kr. litur minni um árið, svarandi til eitt innflutningsvirði upp á 10 mió. kr. um árið. Hetta heldur Orkuráðið kundi verið gjørt við at hækka oljugjaldið munandi, soleiðis at prísurin kom upp á sama støði sum t. d. í Danmark, har ein litur av gassolju kostar 4 kr.

Fyri ikki at leggja stein oman á byrðu – hjá eitt nú barnaríkum familjum – mælir Orkuráðið til, at oljugjaldið verður nýtt sum stuðul til føroyskar landbúnaðarvørur, t. d. mjólk og grønmeti, so at húsarhaldið ikki gerst dýrari av hesum.

pn

119/90

DEYÐANS MAKTARLOYSI

Aftan á at Heilagi Andin var fallin á Hvítusunnu, fór Pætur út at prædika fyri mannfjøldini, ið har var. Hann segði: – Tit menn av Ísrael, hoyrið hesi orð: Jesus úr Nazaret, Mann, ið Gudi var prógvaður fyri tykkum við kraftargerðum, undrum og teknum, sum Gud við Honum gjørdi mitt ímillum tykkara – so sum tit sjálvir vita – Hann, sum eftir fyriskipaða ráði Guds og fyrivitan Hansara varð svikin, Hann drópu tit – Krossfestu Hann við hondum lógloysinga.

Men Gud reisti Hann upp, við tað at Hann gjørdi enda á kvølum deyðans, tí ikki var møguligt, at Hann kundi verða hildin av honum. Síðan endurgevur Pætur sálma Davids, har hann syngur: – Tú skalt ikki lata sál Mína eftir í deyðaríkinum, ei heldur lata hin Heilaga Tín síggja rot. Tú hevur kunngjørt Mær vegir lívsins, Tú skalt fylla Meg við gleði fyri ásjón Tíni.

Pætur boðar her frá maktarloysi deyðans. Deyðin kann ongan halda aftur í deyðaríki, uttan honum sum gjøgnum synd og vantrúgv gevur seg í føvning deyðans. Deyðin er syndanna løn, og tí kann eingin, sum syndað hevur, sleppa úr aftur deyðaríkinum, uttan so at ein syndafríur fer fyri hann í deyðan.

Og tað er tað, ið Jesus gjørdi. Hann fór syndafríur í deyðan, og tí kundi deyðin ikki halda honum aftur, tá Gud kallaði á Hann. Jesus gjørdi eina fyriskipan, sum sigur, at hvør tann sum trýr og verður doyptur skal verða frelstur. Tað vil siga frelstur frá føvningi deyðans.

Paulus skrivar til samkomuna í Róm: Rættvísgjørd av trúgv hava vit tí nú frið við Gud við Harra okkara Jesus Kristi. Og seinni í sama brævi skrivar hann: Ella vita tit ikki, at øll vit, sum doypt eru til Kristus Jesus, eru doypt til deyða Hansara.

Vit eru tá grivin við Honum við dópinum til deyðan, fyri at, eins og Kristus varð reistur upp frá hinum deyðu við dýrd Faðirsins, so skulu eisini vit liva nýtt lív. Tí eru vit samanvaksin við Honum við líkum deyða, skulu vit eisini verða tað við líkari uppreisn. Amen.

Vit lósu úr Áp. 2,27-28 - Mark. 16,16 - Róm. 5,1 og 6,3-5

Bush's popularitet dalende

NEW YORK (RB-Reuter) Præsident George Bushs popularitet er faldet til det hidtil laveste niveau i hans tid som USAs leder, viser en meningsmåling, som blev offentliggjort lørdag.

Målingen, som blev foretaget af dagbladet »New York Times« og tv-selskabet CBS, viser også, at amerikanerne har svindende sympati for både Israel og palæstinenserne.

Ifølge målingen skyldes nedgangen en voksende frustration på grund af den fastlåste krise ved den persiske bugt og mange ældre amerikaneres utilfredshed med Bushs plan om stigende skatter og dyrere sygesikring.

60 procent af de adspurgte bakker op om Bush mod 76 procent lige efter Iraks invasion i Kuwait den 2. august.

30 procent vender sig imod ham, hvor andelen for godt to måneder siden var 15 procent.

Bush er dog stadig mere populær end forgængerne Ronald Reagan og Jimmy Carter var på samme tidspunkt i deres embedsperiode.

Síðani NY ULD kom á marknaðin í jan. 89 er tað vorðið lættari at velja bjálvingartilfar.

Glasuld

Er umhvørvisvinarlig og hevur nógvar avgerandi fyrimunir:

- ☐ brennir ikki
- ☐ vatn rínur ikki við
- ☐ ongin kapilar-súgvan
- ☐ broytir ikki skap

góðskan á Glasuld NY ULD verður regluliga kannað.

Aðrar upplýsingar um glasullstilfar fæst í timburhandlum á staðnum

NY ULD

Glasuld

er tann umhvørvisrætta loysnin til bygging